# Leiðari til sosialu deildina hjá
## Fuglafjarðar kommunu

Fuglafjarðar býráð hevur á fundi tann 30. juni 2005 samtykt at seta sosiala deild á stovn tann 1. oktober 2005 og at søkja eftir leiðara til deildina.

**Starvið**
Tú kemur sum leiðari av Sosialu deild at taka tær av leiðsluni av allari fyrisiting av deildini, herundir málsviðgerð av almannamálum, sum sambært lóggávuni eru ella verða løgd til kommununa. Sum leiðari verður tú eisini skrivari og ráðgevi hjá sosialu nevnd og ráðgevi og málsviðgerði og skrivari hjá barnaverndarnevndini. Leiðarin skal eisini verða við til at byggja upp barnaverndartænastuna, so henda verður virkin tann 1. januar 2006, tá kommunurnar yvirtaka hana. Leiðarin kemur eisini at hava samskifti við m.a. tannlækna, kommunulækna, skúlaheilsusystir, dagstovn, kommunalu dagrøktina og landsmyndugleikar.

**Førleikakrøv**
Vit leita eftir persóni, ið er útbúgvin sum sosialráðgevi. Tó kunnu eftir umstøðunum eisini aðrir umsøkjarar lúka treytirnar, um teir hava aðra í minsta lagi miðallanga útbúgving innan heilsu-, almanna- ella skúlaverk.

**Vit bjóða tær**
Eitt spennandi og sjálvstøðugt starv, har tú sum leiðari fært møguleika til at byggja upp og menna Sosialu deildina frá byrjan av.

**Setanarviðurskifti**
Starvið verður sett skjótast til ber og í seinasta lagi 1. oktober 2005. Starvið verður lønt sambært sáttmála millum Kommunala Arbeiðsgevarafelag Føroya og Starvsmannafelagið.

**Hava tygum áhuga**
So eru tygum vælkomin at senda skrivliga umsókn saman við prógvum og møguligum CV og viðmælum til Fuglafjarðar býráð, Postboks 30, 530 Fuglafjørður, og skal henda verða ráðnum í seinasta lagi mánadagin 8. august 2005 kl. 15.00.

**Fleiri upplýsingar**
Fást við at venda sær til Sigurð S. Simonsen, borgarstjóra á telefon 225111 ella Jákup Frants Larsen, býráðsskrivara á telefon 211102.

Fuglafjørður, tann 7. juli 2005

**Fuglafjarðar býráð**

Landssjúkrahúsið Starvsfólkadeildin

**Landssjúkrahúsið**
Fo 100 Tórshavn

# Sjúkraflutningstænastan

Á sjúkraflutningstænastuni á Landssjúkrahúsinum eru 5 størv á starvsbrøki 1,0 leys at søkja til setan 1. sepetember 2005 ella eftir avtalu. Talan er um føst størv við eitt ára royndartíð.

Starvsøkini hjá Sjúkraflutningstænastuni fevna um Streymoy, Eysturoy, Vágar og Sandoy. Her starvast í løtuni umleið 30 fólk. Deildin hevur 12 bilar, íroknað 9 sjúkrabilar. Vaktsentralurin, ið hoyrir til deildina, er saman við sjúkrabilunum á hvørjum starvsøki mannaður alt samdøgrið.

Tann, ið settur verður, fær neyðuga upplæring í smb. við starvið.

**Tað er ein fyrimunur** at umsøkjarin er búgvandi í Vágunum, har hann partvíst kemur at hava tænastu út frá støðini í Vágunum og partvíst innan hini starvsøkini hjá Sjúkraflutningstænastuni á Landssjúkrahúsinum.

**Arbeiðstíðin** verður eftir nærri avtalu við leiðaran.

**Løn- og setanartreytir** eru smb. sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og Havnar Arbeiðsmannafelag um ambulansustarvsfólk.

**Nærri upplýsingar** um størvini fáast við at venda sær til leiðaran Jákup Nolsøe, telefon 30 45 00 lokal 1130, ella fartelefon 217694.

**Skrivlig umsókn** við avriti av prógvum v.m. verður at senda til

**Landssjúkrahúsið**
Lønar og Starvsfólkadeildin
Att: Una Fagraberg

**Umsóknarfreistin** er mánadagin 25. juli kl. 09.00

*Á heimasíðuni hjá Landssjúkrahúsinum www.lsh.fo sæst meira um størv við at klikka á leinkjuna "starvsfólk.*

# Tilboð upp á skúlabarnaflutning

Fuglafjarðar kommuna loyvir sær hervið at lýsa skúlabarnakoyringina Hellurnar-Oyndarfjørð skúlaárið 2005-2006 leysa frá 15. august 2005 at rokna.

Talan er um flutning av trimum næmingum av Hellunum til skúlan í Oyndarfirði og flutningur aftur til Hellurnar eftir skúlatíð.

Tað verður kravt, at tann ella tey, ið átaka sær skúlabarnakoyringina lúka krøv um, at akfarið, ið nýtt verður, skal verða góðkent og skrásett til vinnuligan fólkaflutning, herundir tryggjað til vinnuligan fólkaflutning, og at førarin hevur galdandi koyrikort til vinnuligan fólkaflutning til persónbil ávikavist buss.

Møgulig tilboð, ið skulu verða skrivlig, skulu vera Fuglafjarðar kommunu, Postboks 30, 530 Fuglafjørður í hendi í seinasta lagi týsdagin 2. august 2005 kl. 15.00.

Kommunan skilir sær rætt til at velja millum innkomin ella einki at taka.

Fuglafjørður, tann 7. juli 2005

**Fuglafjarðar býráð**


Internet Sosialurin
www.sosialurin.fo

Starvslýsingar




á portal.fo

Kostnaður: (um lýsingin eisini er í Sosialinum)

| | |
|---|---|
| 1 vika | kr. 500,- |
| 2 vikur | kr. 750,- |
| til freistin at søkja er úti: | kr. 1.000,- |

Kostnaður: (um lýsingin ikki er í Sosialinum)

| | |
|---|---|
| 1 vika | kr. 750,- |
| 2 vikur | kr. 1.000,- |
| til freistin at søkja er úti: | kr. 1.250,- |

**2 lýsingar = -20% í avsláttri**
**3 ella fleiri = -30% í avsláttri**

Sosialurin
tel 341800 · fax 341801
teldupostur: lysing@sosialurin.fo

LEIGA AMBOÐ & MASKINUR
Kaj Andreasen & Co
BREKKUTÚN 7 · 188 HOYVÍK
TEL 31 56 00

KAMPANJUAVSLÁTTUR UPP TIL
45.000 KR
VOLVO
FOR LIFE
VR BILAR

Sosialin


# Kom við á familjulegu

**Stað:** Leguhúsið í Nesvík

**Tíðarskeið:** 30. juli til 3. august.

**Tekning:** Tel. 319655 ella Solgerdar@kallnet.fo

**Tekningarfreist:** Mánadagin 11. juli.

**Landsfamiljunevndin hjá Heimamissiónini**